# GENIALT!



Gamla Hoyvíkin er upplagt mið, um undirvísingin eisini skal fevna um søgu

**MYNDIR:** HELENA DAM



Niels Áki og Finnur Meinhard vóru í fjøruni og stungu fliður



Rókur og Eyðfríð taka sær av løttum, meðan matpakkin verður etin

fram til, nær og við hvørjum bussi hetta skuldi vera.

– Komin til ferðamálið varð flokkurin býttur í bólkar, og skjótt høvdu tey skipað seg bæði væl og virðiliga, soleiðis at tey kundu fara til verka. Nøkur teirra skuldu í fjøruna at finna ymisk djór, ið har vóru. Onnur skuldu hjálpa til við at kóka súpan, sum vit fingu at eta, og tá skuldi bæði vigast, lesast og roknast, soleiðis at uppskriftin varð fylgd. Uppaftur onnur skuldu syrgja fyri, at bálið til matgerðina varð gjørt á forsvarligan hátt, og soleiðis kundi eg hildið á fram. Í flestøllum lutum var læra og logikkur innbygdur partur av stuttleikanum og upplivingini. Tekning,



Tá matur skal gerast, mugu næmingarnir duga at handara køksamboð, flysa, skera, viga og lesa. So frálæra er alla tíðina partur av stuttleikanum

skriving og sangur var eisini partur av degnum. Legg hartil søgu, mentan og tað at undrast og fata afturat. Alt eginleikar, sum eru partur av teirri menning og búning, sum er við ti lat brynja børn og ungdóm okkara til framtíðar avbjóðingar.

– Nú endaði mín dagur longu um hálvgum eitt tíðina, tí eg noyddist at fara víðari á ein fund, so eg fekk ikki verið partur av uppfylgingini. Men sum eg havi skilt tað, so er undirvísingin eisini skipað soleiðis, at arbeitt verður víðari aðrar dagar við tí, sum børnini læra og uppliva, tá útiskúlin er á skránni.

– Umframt bókligu førleikarnir, sum altso eru partur av slíkum útiskúla, so má eg eisini leggja afturat, at eg var imponerað av, hvussu væl næmingarnir dugdu at skipa seg, og at mest sum ongar ósemjur vóru. Tað eru ivaleyst eisini aðrir lutir, sum spæla inn í hesum, men eg ivist onga løtu í, at vikuligi útiskúlin eisini er við til menna hendan partin, sigur Helena Dam á Neystabø at enda.